# Úr tjóðbanka í Eik

63 ára gamli tjóðbankastjórin í Danmark, Torben Nielsen, verður nýggjur nevndarformaður í Eik Banka. Hann tekur við 1. apríl.

Torben Nielsen hevur útbúgving úr sparikassa, hevur eina HD



**63**

í organisatión, kreditt og fígging. Hann hevur arbeitt í Bondestands Sparekasse, Sparekassen SDS sum undirstjóri, varastjóri og økisstjóri. Í 1990 kom hann í Unibank sum deildarleiðari og varastjóri. Síðani 1996 hevur hann verið limur í stjórnini í Danmarks Nationalbank.

Síðani 2008 hevur hann verið adjungeraður professari við Copenhagen Business School, Center for kre-




## Sparikassamaður í Eik

ditret og kapitalmarkedsrett. Í 2003 bleiv hann riddari av Dannebrog.



*Hvat er betri enn ein nakin kvinnukroppur, spurdi ein lurtari hjá Rás2 Jenis av Rana: – Eingin maður kann siga nakað ímóti tí, segði Jenis. Skapanarverkið er ótrúligt, tað er heilt fantastiskt. - Íslendingar hava bannað striptease í sínum landi. Tað eiga vit eisini at gera.*



## Søgan um Vestmanna

Á Bryggjuni í Vestmanna í annaðkvøld, leygarkvøldið, fer Helgi Jacobsen, tíðindamaður, at greiða frá arbeiði sínum at skriva Vestmanna søgu, sum hann er í ferð við. Hann fer at greiða frá søgum, ókendum sum kendum.

eirikur@sosialurin.fo

# Slapp ikki undir skurð

**TÓNLEIKUR Eftir ætlan skuldi Jens Marni Hansen undir skurð fyri stemmubondini í síðstu viku, men læknarnir mæltu frá**

Barbara Holm

Vandin fyri at missa sermerktu røddina varð ov stórur.

Tað gjørdist fyri stuttum greitt, at Jens Marni Hansen skuldi á Ríkissjúkrahúsið, har stemmubondini skuldi undir skurð. Men læknarnir hildu tað verða ov stórur vandi fyri, at tað sermerkta við røddini hjá Jens Marna Hansen fór at detta burtur.

Men Jens Marni Hansen heldur ikki, at túririn til Keypmannahavnar er farin fyri skeyti, hóast eingin skurðviðgerð bleiv.

– Læknin greiddi mær væl frá nógvum týdningarmiklum viðurskiftum við míni rødd, so eg fekk nógv burturúr at tosa við hann, sigur Jens Marni Hansen.

Um støðan hjá stemmubondunum hjá Jens Marna Hansen versnar, so er altíð møguleiki fyri at leggja hann undir skurð seinni.



*Ov stórur vandi var fyri, at sangarin Jens Marni Hansen fór at missa tað sermerkta við røddini, um hann varð lagdur undir skurð sum ætlað*

# Jóna í Listaskálanum

**FRAMSÝNING Í morgin letur upp listaframsýning hjá Jónu Rasmussen í Listaskálnum í Havn**

*Framsýningin hjá Jónu Rasmussen er opin frá 5. februar til 13. mars*

Eirikur Lindenskov

Á framsýningini verða alskyns grafikkur, málningar og installatiónir at síggja. Listasavnið gevur samstundis út bók um listakvinnuna, sum listfrøðingurin Eva Furseth hevur skrivað. Bókin er á føroyskum, norskum og enskum.

Jóna Rasmussen (f. 1946) er ein fjølbroytt listakvinna. Hon málar og granskar alskyns grafiska tøkni. At tað, ið Jóna Rasmussen letur úr hondum, er latið í nógvar ólíkar listabúnar, ber boð um eina listakvinnu, sum ikki hevur hug altíð at standa í sama staði, men verður nú sum fyrr drivin av forvitni og ævintýrhugi. Verkini eru mangan arbeidd sum røðir av slíkum myndum, har broytingar sipa til ringrørslur, og reikandi formar teirra menna seg alsamt. Komnir aftur til upprunan eru teir vorðnir øðrvísi.

Eins og menniskjað í samfelagnum broytist gjøgnum upplivingar, samstundis sum at lívið endurtekur seg í dagar, ár, ættarlið og tíðarskeið. Tað ekspressiva í verkunum rennur saman við ein fínligan sans fyri tí einfalda og nærum minimalistiska. Myndevnini verða skorin inn á bein, samstundis sum hon varðar um tað sansaliga og ábendandi. Júst samspælið millum teir ætlandi pólarnar gevur eina huglagsmettaða uppliving.



Jóna Rasmussen hevur frá fyrstantíð havt eina serstaka myndsøgn og verið eitt av listafólkunum, sum settu fyridømi í føroyskari list.

Martin Næs, stýrisformaður Listasavns Føroya, letur framsýningina upp. Sigrið Rasmussen luttekur við sangi.